# Oljuserblað á enskum

**Miðsíðurnar í Sosialinum í dag eru settar av til serblað um stóru oljuráðstevnuna, ONS 08, sum verður í Stavanger í komandi viku. Blaðið er á enskum, tí tað verður tøkt á ráðstevnuni**

VINNA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Føroyar og føroyingar eru í dag virknir leikarar í altjóða oljuvinnuni. Føroyskar oljufyritøkur gera seg galdandi í oljuleitingum og oljuborðingum uttanfyri Føroyar, altjóða oljufyritøkur hava framvegis stóran áhuga fyri føroyska økinum, og føroyskir undirútvegarar hava dugað væl at bjóða seg fram í hørðu altjóða kappingini.

Í komandi viku verður stór altjóða oljuráðstevna í Stavanger í Noregi, og her eru almennu Føroyar og privatar føroyskar fyritøkur sjálvandi eisini við. Í hesum sambandið hevur Sosialurin gjørt eitt serblað við lýsingum og greinum um føroysku fyritøkurnar og tey mentanartilboð, sum føroyingar bjóða fram í Stavanger. Blaðið er á enskum, tí tað í fyrsta umfar er ætlað útlendskum kundum og gestum. Men vit hava tað eisini við í dagsins blaðið, tí føroyski lesarin skal eisini fáa høvi at lesa tað nýggjasta um føroysku oljuvinnuna.

Onkrar av greinunum koma ætlandi á føroyskum eisini. Í dag hava vit greinina um føroysku KT fyritøkuna, Keel Solution, á síðu 10.




*Oljublaðið, ONS 08, er á enskum máli, men onkur grein er eisini á føroyskum í vanliga Sosialinum í dag*

**Grønlandstíðindi** Kári við Stein

**Grønlandstíðindi:**

# Fylti lastina eftir tveimum samdøgrum

**Kári við Stein greiðir frá tíðindum úr Grønlandi. Her fylla teir smáu rækjuskipini eftir fáum samdøgrum**






*Lómur í Ilulissat við fullari last 130 tons av rækjum, sum eru fiskaðar eftir tveimum samdøgrum*

### 4. august

Tað er greytasvart í toku í morgun. Qaqqatsiaq kom inn í morgun at landa. Teir hava gott 400 tons inni. Teir máttu byrja at landa við Skonnertkeiuna, sum vit kalla. Tað bleiv bara landað úr forlúkuni har, tí eitt feramannaskip skuldi liggja, har sum Qaqqatsiaq skuldi landa. So væl er fyriskipað, at tað sum Grønland skal liva av, havinum, verður bara skumpað til síðis fyri turistum.

Nú vit eru við turismuna, so er eingin sum hugsar um trygdina. Tað er bara pengar, sum ferðamannavinnan hugsar um. Eg bíði bara til tann stóra vanlukka hendur, so sum at hesi stóru skipini sigla á land ella tað kemur eldur í umborð. Ferðafólkini eru ofta so illa gongd við tveimum stavum. Vil illa til koma hesi illa gongdu at blokera fyri teimum, sum kunna klára seg sjálv. Tá fara kanska tey, sum hava ábyrgdina, at vakna við kaldan dreym.

Tarsermiut kom inn til Nuuk í dag at landa.

### 5. august

Tað er toka aftur í morgun, men hon lætti fyrrapartin. Qaqqatsiaq fór avstað fyrrapartin, og nú í kvøld kom Akamalik inn at landa.

### 6. august

Í dag er stilli. Akamalik legði í dag 440 tons upp. Virðið er 7 mill. Higartil í ár hevur Akamalik fiskað fyri knappar 80 mill. Teir loystu nú seinnapartin til nýggjan túr.

Sisimiut er í Nuuk og landar svartkalva. Teir hava fiskað ta sunnaru kvotuna, gott 230 tons. Nú fara teir at fiska ta norðaru kvotuna av svartkalva.

Polar Qrasiut er í Nuuk og landar í dag. Har var um at vera fult hjá teimum.

### 7. august

Í dag er stilli, men tokubankar. Ocean Tiger kom inn at landa í morgun. Teir hava fulla last inni. Bæði Regina og Steffen C eru inni í Manitsoq og landa í dag.

### 8. august

Í dag er stilli, sólin er høgt á himli. Ocean Tiger var útlossaður í nátt kl 0200. Teir loystu so skjótt sum flúgvarin kom úr Streymfjørðinum viđfólkinum til nýggjan túr.

### 11. august

Í dag er Kappin kom inn at leggja ymiskt upp, tí teir skullu fara at taka ímóti fiski longri suðuri á. Kappin hevur tikið ímóti knapt 1.300 tonsum av rundum fiski.

So kom Juvel II sum hoyrir heima undir Broðrasamkomuni. Skipari er Arni Hansen úr Gøtu. Umborđá Juvel II eru 16 fólk, 10 føroyingar og 6 grønlendarir. Teir skulla norður í Diskovíkuna at halda møtir har uppi.

So kom Natarnaq undan tokuni inn at landa. Har var fult undir lúkuna hjá teimum. Teir hava fiskað í 9 dagar, óført.

### 15. august

Í dag er stilli. Ocean Tiger kom inn at landa knapt 200 tons. Polar Amaroq kom inn higar eftir pakningi. Teir høvdu landað í Manitsoq og teir høvdu fulla last inni. Polar Assik hevur landað í Aassiat knapt 70 tons. Hesin túrurin vardi í 36 tímar í alt. Teir hava stutt út á rækjufeltið. Hetta var 12 túrur hjá Polar Assik. Teir byrjaðu fiskarí fyrsta túrin 5 juli, og teir hava í miðal avreitt gott og væl 60 tons hvønn túrin.

Bæði Polar Amaroq og Tigarin loystu aftaná døguða til nýggjan túr. Frætt er, at Polar Princess hevur fingið maskinskaða og varð sleipaður til Íslands. Tað koma nokk at ganga einar tríggjar vikur at umvæla skaðan.